## Tríggir sáttmálar verða til ein

Í gjár, tann 4. desember, gjørdi Fíggjarmálaráðið sáttmála við tey fýra feløgini Arkitektafelag Føroya, Føroya Byggifrøðingafelag, Magistarafelag Føroya og Føroya Verkfrøðingafelag. Talan er um eitt 5 ára skeið. Teir tríggir verandi sáttmálarnir eru framlongdir fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober í 2005 til 1. oktober í 2007. Síðan er ætlanin at tey fýra feløgini hava bara ein sáttmála, og at eitt felag, sum helst kemur at eita Akademikarafelag Føroya, skal hava samráðingarrættin. Semja er um sáttmálan, eftir eru bara formlig viðurskifti. Tann nýggi sáttmálin er avtalaður fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober í ár til tann 1. oktober í 2010. Karmurin um sáttmálarnar er sum í hinum almennu sáttmálunum, 0,9% fyrsta árið, 1,7% annað árið, og síðan 3% um árið í trý ár.

## Deiggj gongur aftur á Tvøroyri

Manningin í Deiggj leitar aftur til røturnar og spælir í heimstaðnum leygakvøldið Nógv jólaborðhald eru um vikuskiftið og tí hevur Tvøroyrar Klubbi fingið Deiggj at spæla leygarkvøldið. Deiggj er gamal bólkur, sum byrjaði á Tvøroyri fyri eini 25 – 30 árum síðani. Manningin er í dag bland av upprunamanning og øðrum, sum tó hava verið við rúma tíð og meginparturin av manningini býr nú í Havn. Bólkurin gav plátu út fyrst í áttatiárunum og hevur eisini verið at hoyrt á útgávum síðani. Deiggj spælir blandaðan tónleik, men fjalir ikki, at teir í bólkinum eittnú dáma væl Gasolin og góðan rocktónleik annars, og teir spældu eisini undir hjá John Lawton úr Uriah Heep á Jóansøkufestivalinum fyrr í ár. Deiggj spældu síðsta vikuskiftið í Havnar Klubba og var hetta væleydnað vikuskiftið við nógvum áhoyrarum, frættist frá Deiggj.

# SMS fingið skeinkiloyvi

**Men talan verður ikki um eina barr. Tvørturímóti er øll verkætlanin grundað á eina fyrsta floks matstovu, har klassi skal viga upp móti vantandi romantiskum umhvørvi, sigur Havgrímur Johannesen, eigari**

SKEINKING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Tað er Havgrímur Johannesen, sum stendur aftan fyri nýggju matstovuna, Williams, í SMS*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nú er Perlan farin í søguna – fyri í minsta lagi aðru ferð. Men úr »øskuni« hevur reist seg ein nýggj matstova, ið skal tekkjast fyrst og fremst barnafamiljum, men annars øllum, sum leggja dent á fyrsta floks mat og lágan prís, fram um dýrt keypta atmosferu.

- SMS ynskti at skapa eina betri matstovu enn Perlan var, og tí heittu teir á okkum, sum framman undan hava fastfood matstovurnar Burger King og Sunset, umframt kaffistovuna Baresso. Nú var tað eingin avbjóðing at gera eina betri matstovu enn Perlan var, spurningurin var meiri hvat konsept vit valdu, sigur Havgrímur Johannesen.

Tá nú hann framman undan hevði matstovur, sum eru liður í sonevndum matketum, mundu tað vera mong sum væntaðu, at ein matstova í sama flokki fór at loysa Perluna av, eitt nú Jensen's Bøfhus. Men Havgrímur vildi royna nakað annað.

- Eg vildi gera eina fyrsta floks matstovu við fyrsta floks rættum, men samstundis fyri ein prís, sum øll kunnu rinda. Eisini vildi eg, at matarskráin skuldi fylgja árstíðini, og tað ber ikki til tá talan er um matketur, sigur Havgrímur Johannesen.

Talan skal í allar mátar verða um fyrsta floks mat. Tríggir hotellkokkar eru settir í starv, og rávøran er fyrsta floks.

- Vit nýta bara tað besta av tí besta, tá tað kemur til rávørurnar. Zew Zealandskt oksakjøt fram um bíligara brasilianska kjøtið, til dømis. Og alt, sum vit yvirhøvir kunnu gera sjálvir, verður heimagjørt, sigur Havgrímur Johannesen.

### Skeinkiloyvi

Tað er eingin loyna, at eitt nú SMS til fánýtis áður hevur søkt um skeinkiloyvi. Men eftir at festivalar og onnur tiltøk hava fingið loyvi at skeinkja, var ikki longur nøkur haldgóð grund at nokta SMS hetta loyvi.

Men Havgrímur Johannesen leggur dent á, at tala avgjørt ikki er um nakra barr.

- Tá vit fara at bjóða »bestu búffar í býnum« fram, vildi tað verið stór synd, um ikki bar til at drekka eitt glas av víni afturvið. Og at tað er hetta, vit hava lagt dent á, vísir, at vit bert hava søkt um hálvt skeinkiloyvi, tað vil siga til øl og vín, men ikki teir sterkaru løgirnar, sigur Havgrímur Johannesen.

Hetta passar eisini betur inn í umhvørvið í SMS.

- Vit vita jú, at tað vitja nógvar barnafamiljur í SMS, og tí er tað eitt fullkomið høvi hjá foreldrunum at fáa sær ein góðan búff á Williams, meðan børnini hugna sær við einum burgara inni á Burger King og hyggja eftir einum góðum filmi, sigur Havgrímur Johannesen.

Og júst »óromantiska« umhvørvi hevur ført til, at ógvuliga nógv er gjørt burtur úr, at kundarnir skulu kenna seg væl. Bæði borð, stólar og lampur eru sniðgevaramøblar.

Alt hetta, ikki minst saman við navninum Williams, sum sipar til okkara kenda rithøvund og málara William Heinesen, skal geva matstovuni ein mentanarligan dám, sum boðar frá, at her kemur mann ikki inn at tylla øl í seg, men fyri at fáa eina kulinariska uppliving.

Og hóast tað ikki verður byrjað at skeinkja á Williams fyrr enn í næstu viku, hevur matstovan longu verið sera væl vitjað, síðani hon læt upp síðsta hósdag.

Matstovan letur upp klokkan níggju á morgni, men byrjar ikki at skeinkja fyrr enn klokkan ellivu. Annars er opið frá níggju á morgni til átta á kvøldi hvønn dag uttan sunnudag, tá latið verður upp klokkan tvey.



*Innanfyri eina til tvær vikur, ella í seinasta lagi beint undan jólum, verður møguleiki at keypa øl og vín á matstovuni á flogvøllinum í Vágum*

*Savnsmynd*

# Øl og vín á Flogvøllinum

**Eins og í SMS hevur matstovan á Flogvøllinum í Vágum fingið skeinkiloyvi. Hetta merkir, at longu nú í desember fer at bera til at keypa øl og vín á flogvøllinum**

SKEINKING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Fyri viku síðani fingu eigararnir av 62º Norður, sum eigur kaffi- og matstovuna í Floghavnini í Vágum, at vita, at skeinkiloyvið, ið teir søktu loyvisnevndina um, verður játtað.

Talan er um tað minna loyvir, sum merkir, at tað ikki verður loyvi at skeinkja løgir sterkari enn heitvín, ið liggur á leið 22 prosent. Altso verður bert talan um øl og vín og ikki brennivín.

- Vit síggja hetta sum eina heilt natúrliga menning, at vit nú fáa loyvi til at skeinkja eitt glas av víni ella ein øl saman við matinum. Hetta ger man í øllum floghavnum, so sjálvandi eiga vit at kunna gera hetta eisini, sigur Kent Christensen.

Hann vísir á, at krøvini um at innskriva seg til flúgving tíðliga, eru skerpaði, og hetta merkir, at ferðafólk koma at uppihalda seg longri á flogvøllinum. Harafturat er júst á flogvøllinum í Vágum vandi fyri at koma at bíða leingi at sleppa avstað, orsakað av mjørka og veðrinum annars.

Spurdur um hetta merkir, at matstovan fer at halda longri opið, sigur stjórin í 62º Norður, at tað væntar hann.

- Hetta fer at geva okkum møguleikar fyri at økja umsetningin, og tí kann tað fara at loysa seg at víðka upplatingartíðirnar, sigur Kent Christensen.

Longu nú sæst ein broyting í útboðnum á matstovuni, tí í síðstu viku opnaði ein morgunbuffét framman fyri matstovuni.